VINNU SÍÐURNAR
Nr. 106 • mikudagur • 8. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hevur bakað í meira enn 40 ár



*Oddur Heinesen við abbasoninum í føvninginum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Eg hevði ikki væntað, at so nógv fólk kendu meg, segði Oddur Heinesen, bakari, tá ið Miðberg Bakarí skipaði fyri móttøku fyri honum, nú hann hevur tænt bakarínum í Saltangará í 35 ár**



*Nógv fólk nýttu høvi at heilsa Oddi hendan merkisdag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

MÓTTØKA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógv fólk vóru til móttøku, tá ið Miðberg Bakarí í Saltangará ynskti at "markera", at Oddur Heinesen hevur verið í starvi sum bakari hjá bakarínum í samfull 35 ár.

Fólk komu við blómum og heilsanum, og í stuttum práti inni á gólvinum hendan dagin, segði Oddur Heinesen, at hann var rættiliga ovfarin av, at so nógv vóru komin inn á gólvið.

- Eg hevði ikki væntað, at so nógv fólk kendu meg, segði hann, meðan hann stóð við abbasoninum, sum eisini var komin til móttøkuna, í føvninginum.

## Kunoyingur

Oddur er ættaður úr Kunoy. Sum ungur giftist hann Eyðbjørg, sum er ættað av Toftum. Tey búsettust í Saltangará, har tey framvegis búgva. Oddur er eisini bróður Heina O. Heinesen, sum allir føroyingar kenna. Tey eru fleiri systkin, og hesi nýttu eisini høvi at heilsa bróðrinum og bakaranum á stóra degnum.

Tey, sum kenna Odd, siga, at hann er ikki maðurin við teimum stóru "albogunum", men hann er ein ógvuliga fryntligur maður - og ein dugnaligur og skjótførur bakari.

- Hann verður ikki tikin í sínum arbeiði, siga tey, sum kenna hann.

## Lærdi hjá Alla

Oddur fór í sínari tíð at læra til bakara hjá Alla í Klokkaragøtu í Havn, og har arbeiddi hann eisini eitt ár eftir, at hann var vorðin sveinur.

- Eg havi soleiðis bakað í meira enn 40 ár, sigur Oddur.

Spurdur, hvussu nógv breyð hann í miðal man hava bakað um dagin, heldur hann fyri, at talan helst eru um eini 500 rugbreyð og 500 fransbreyð.

Oddur Heinesen hevur trivist væl sum bakari, og honum hevur dámað væl hjá Miðberg Bakaríi, sum nú hendan dagin nýtti høvi at heiðra henda stillføra og roynda bakaran.

# Fiskur og ferðagóðs rigga ikki saman

**Av og á hevur spurningurin um loftvegis útflutning av fiski verið frammi, men Richard Leonson, sum starvast á flogvøllinum í Vágum, heldur, at hetta bara er "snakk", sum hann tekur til**



*- Tað riggar ikki at útflyta fisk loftvegis við ferðafólkaflogførum. Dryppar úr fiskakassa, er neyðugt at loysa túsund skrúvur fyri at fáa fiskaroykin úr aftur viðførisrúminum, sigur Richard Leonson*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FLUTNINGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á flogvøllinum í Vágum seinasta hósmorgun hitti Sosialurin Richard Leonson, ið hevur starvast sum "handlingsmaður" á flogvøllinum í eini 40 ár. Hansara uppgáva er at fylla viðførið hjá ferðafólki, post og frakt í og úr flogførunum, sum koma og fara. Teir eru tilsamans átta mans – fýra á hvørji vakt, sum taka sær av hesum arbeiði. Richard er royndur í leikum og hevur í síni longu starvstíð upplivað eitt sindur av hvørjum. Hann var eisini staddur á flogvøllinum, 26. september í 1970, tá ið flogfarið úr Íslandi datt niður í Mykinesi.

- Tá sat eg her vesturi og tók telefonina, men eg visti av ongum, tá ið eg fór til hús hendan feigdardag, sigur hann.

## Livandi hummari

Richard sigur, at nú hummaratíð er, fer fitt av livandi hummara av landinum við flogfari.

- Í morgun fóru soleiðis 37 eskjur, og viðhvørt fara einar 2-3 sendingar um dagin. Ein vanligan dag fara einar 60 eskjur við himmara av landinum.

Hann sigur, at eskjurnar, sum eru úr flamingo-tilfari, viga eini 13-14 kilo hvør.

Føroyskur hummari er sendur livandi av landinum við flogfari nú í nøkur ár.

Richard vísir á, at er tað soleiðis, at hummari, sum er komin vestur í Vágar, ikki fer avstað sama dag, tí pláss ikki er í flogførunum, kemur útflytarin vestur aftur eftir eskjunum og sleppur hummarunum í sjógv, til hann kemur vestur aftur við teimum.

## Fiskaflutningur

Av og á hevur verið kjakast um, hví føroyingar ikki senda feskan fisk av landinum loftvegis, men hetta heldur Richard bara vera "snakk", sum hann tekur til.

- Tað fer at kalla eingin fiskur av landinum loftvegis, og tað er einki at siga til, tí tað riggar ikki at flyta fisk út í ferðafólkaflogførum.

Hann vísir á, at flogførini taka eini trý tons av farmi tilsamans, og tað er eingin nøgd at tosa um.

- Dryppar úr einum fiskakassa, er neyðugt at loysa einar túsund skrúvur, um fiskaroykurin skal fáast úr viðførisrúminum aftur. So, hetta er avgjørt ikki væl egnaður flutningur til fisk.

Richard Leonson heldur, at skulu vit tosa um veruligan loftvegis útflutning av fiski, er neyðugt við flutningsflogførum.

- Men eg dugi ikki at síggja, at tann stóri áhugin er fyri hesum, leggur hann aftrat.